# Kenna seg tryggan í lít



*Haldórsvíkar skúli er tvíflokkaður - teir yngru næmingarnir eru fyri seg og teir eldru fyri seg*

**Hóast talið av skúlabørnum í Haldórsvík er í minking, læra tey júst tað sama sum hinir næmingarnir kring landið. - Hugurin hjá okkum at undirvísa minkar í øllum førum ikki, sigur Nomi Jacobsen, skúlaleiðari**

BYGDARSKÚLIN
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Haldórsvík:** Mitt í bygdini liggur tann lítli bygdarskúlin væl staðsettur.

Beint við skúlan liggur ein sparkivøllur, høli til dagrøktina og ikki minst ein lítil sandur. Her er talan um eitt rættiliga barnaumhvørvi.

Tað er fríkorter beint nú henda, og børnini skunda sær út í góða veðrið henda vakra týsmorgunin: Dreingirnir við bólti og genturnar við einum hoppibandi, meðan ein er farin ein túr oman í fjøruna. at leita eftir onkrum.

Bygdarskúlin í Haldórsvík hevur í løtuni 19 næmingar, men mangt bendir á, at tey einans verða 15 eftir summarfrítíðina.

- Hóast henda veruleika hevur tað ikki minkað um hugin at undirvísa børnunum her. Heldur hinvegin, sigur skúlaleiðarin Nomi Jacobsen.

Ein lítil bygdarskúli hevur eisini tørv á at seta sær síni mál í undirvísingini og at gera eina undirvísingarætlan fyri alt árið.

Børnini í Haldrósvíkar skúla skulu ikki vera verri fyri enn aðrir næmingar kring landið!

## Flyta av bygdini

Hóast lítli bygdaskúlin í Vík er bæði væl útgjørdur, hevur góðar lærarar og liggur væl fyri mitt í bygdini, kann sannleikin ikki krógvast burtur.

Tey trý árini, ið Nomi hevur starvast við skúlan, er talið av skúlabørnum minkað munandi. Spurningurin er, um til ber at steðga hesi gongdini.

Fyri trimum árum síðani var næmingatalið í teimum sjey flokkunum uppi á 25 næmingum. Í dag er talið komið niður á 19 og er framvegis í minking.

Henda sama gongdin sæst eisini aftur í fólkatalinum í bygdini, sum í november mánaði í fjør var 148, í mun til 161 hálvt ár frammanundan.

Tað er ikki tí at skúlin á nakran hátt er vánaligur, at talið av skúlabørnum minkar.

Veruleikin er hin einfaldi, at fólk flyta av bygdini og longur suður í kommununa!

## Eingin handil

Fyrr var bæði fiskaarbeiði, peningastovnur og handil - og enntá ein grill - í bygdini, men so er ikki longur.

Í bygdini er ikki so nógv arbeiði longur, og víkafólk hava tí arbeiði í økinum við Streymin ella aðrastaðni á meginlandinum.

Fólk skulu haraftrat koyra børnini til ítrótt og annað virksemi, og fyri mong er kanska eisini meiri lív í og størri virksemi, tess longur suður ein kemur í ta stóru Sunda kommunu.

Tað tykist sum um at fólk ynskja heldur at búgva nærri miðøkinum við Streymin. Har er ein jú munandi tættari við tær ymisku tænasturnar, ið bæði børn og vaksin hava brúk fyri í tí dagliga.

Tað er tí munandi einfaldari hjá fólki í hesum økinum at fara í ein peningastovn ella til handils á Norðskála.

- Her í Haldórsvík er jú ikki so frægt sum ein handil, sigur Nomi.

## Gott stað hjá børnum

Spyr ein børnini í Haldórsvík hvat tey ynskja innast inni, man lítil ivi vera um svarið: - Vit vilja búgva her!

Haldórsvík er ein sera góð bygd fyri børnini. Hon er hugnalig og gevur børnunum møguleikar fyri ymiskum virksemi - ikki minst við lítla sparkivøllin sum liggur beint við skúlan.

Jú, hetta er eitt gott stað fyri børnini, eru øll samd um. Spælt verður úti til langt út á kvøldarna, júst soleiðis sum tey gjørdu áður.

Men hinvegin, tá foreldrini ikki hava nakað arbeiði í bygdini og mugu aðrastaðni at gera hetta, er tað helst bert ein spurningur um tíð, nær talið av skúlabørnum fer at minka enn meiri.

Tað er undir hesum veruleika at teir fýra lærararnir við skúlan arbeiða undir í tí dagliga. Tær fýra kundu kanska freistast til at minka um arbeiðshugin, arbeiðsgleðina og ídnið eftir at læra børnini setningin fyri dagin.

Men soleiðis er støðan als ikki her í Haldórsvíkar skúla:

- Nei, hugurin at undirvísa, hann er hin sami og góði, hóast tað bert verða einir 15 næmingar næsta skúlaár, sigur Nomi og veit, at hon hevur hinar tríggjar lærararnar aftanfyri seg í hesi útsøgnini.

Tær fýra eru greiðar um, at tann dagin tær sleppa huginum, gleðini og ídninum at undirvísa, er tíð at gevast.

## Lofta einum næmingi

Sum skúlaleiðari dugir Nomi væl at síggja bæði fyrimunir og vansar í einum skúla við so avmarkaðum tali av næmingum.

Hyggur ein fyrst eftir fyrimununum, so kemur lærarin at kenna tann einstaka næmingin munandi betri, tí hann hevur tey í fleiri ymiskum lærugreinum gjøgnum vikuna.

- Tað er eisini lættari hjá okkum at lofta einum næmingi, um hesin ikki klárar at